# Bygdaráðsfundur 30.05.2022

**Bygdaráðsfundur 30.05.2022 kl. 18.00**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhøli | |
| Hjástødd: | Súni í Hjøllum, borgarstjóri | x |
| | Heini S. Kristiansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Jan Højgaard | x |
| | Petur Jákup Petersen | avboð |
| | Rannvá í Túni Petersen | x |
| | Elsbet E. Magnussen, skrivari | x |

**Mál til viðgerðar:**

| | |
|---|---|
| Mál nr. 63/2022 – Eykajáttan til Tónleikastovu 2. Viðgerð | ALMENT |
| Mál nr. 64/2022 – Ársroknskapur – Kongshavnar Havn | ALMENT |
| Mál nr. 65/2022 – Reguleringar til Fíggjarætlanina | ALMENT |
| Mál nr. 66/2022 – Fíggjarætlan 2023 – Bókasavnið í Nes kommunu | ALMENT |
| Mál nr. 67/2022 – Loyvi til taðing – Mortan Højgaard | ALMENT |
| Mál nr. 68/2022 – Umsókn um broytan av byggiloyvi til bilskúr – Christian Andreasen | ALMENT |
| Mál nr. 69/2022 – Umsókn um grundstykki – Eli í Hjøllum | ALMENT |
| Mál nr. 70/2022 – Máling av Barnagarðinum | ALMENT |
| Mál nr. 71/2022 – Útbjóðing av jørð á Regnavegnum og Høganesvegnum | ALMENT |
| Mál nr. 72/2022 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 73/2022 – | AFTURLATIÐ |

**Mál nr. 63/2022 – Eykajáttan til Tónleikastovu 2. Viðgerð ALMENT**
J.nr.:1901-2-2022

Ætlanir eru um at umvæla eina skúlastovu í Tofta skúla til tónleikastovu.

Tann 12.04.2022 kl. 14.00 var lisitatión á kommunuskrivstovuni. Hóast fýra fyritøkur vóru bodnar at bjóða, so kom bara eitt tilboð inn. Tilboðið er frá KBH og ljóðar á kr. 1.433.515.

Teknistovan í Gøtu mælir til at fara í samráðingar við KBH og at taka av tilboðnum.

**Á fundi tann 25.04.2022 mælir Tekniska nevnd til at fara í samráðingar við KBH um at gera møguligar sparingar/tillagingar og at taka av tilboðinum.**

**Á fundi tann 26.04.2022 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd og at fíggja 1 mió av stovninum "skúlin íløga" og at ein eykajáttan verður givin á kr. 650.000 og verður tikin av tøkum peningi.**

**Tilmælini hjá Teknisku nevnd og hjá Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**Á fundi tann 23.05.2022 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd og at fíggja 1 mió av stovninum "skúlin íløga" og at ein eykajáttan verður givin á kr. 650.000 og verður tikin av tøkum peningi.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 64/2022 – Ársroknskapur – Kongshavnar Havn** **ALMENT**

J.nr.: 1107-1-2022

Ársroknskapurin hjá Kongshavnar Havn er komin til ummælis hjá kommununi.

| **Rakstrarroknskapur** | **Nota** | **Ætlan 2021** | **2021** | **2020** |
|---|---|---|---|---|
| Havnagjøld | 1 | 1.635.000 | 1.783.496 | 1.678.434 |
| **Inntøkur Brutto** | | **1.635.000** | **1.783.496** | **1.678.434** |
| Uppkrevingarkostnaður | 2 | - 408.750 | - 445.874 | - 419.609 |
| **Inntøkur netto** | | **1.226.250** | **1.337.622** | **1.258.826** |
| Fyrisiting | 3 | - 82.500 | - 128.061 | - 82.777 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | | - 2.000 | - 3.353 | - 1.871 |
| Marknaðarføring | | - 90.000 | - 90.000 | 0 |
| Umhvørvi (Ljóðdálking) | | - 25.000 | 0 | 0 |
| Fishing for litter | | 0 | 0 | 0 |
| Rudding | | - 70.000 | - 90.000 | - 70.000 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Úrslit áðrenn rentur** | | **956.750** | **1.026.208** | **1.104.177** |
| Rentuinntøkur og tílíkt | | 0 | 0 | 0 |
| Rentuútreiðslur | | - 1.000 | - 22.133 | - 14.398 |
| **Ársins úrslit** | | **955.750** | **1.004.075** | **1.089.779** |

**Fíggjarstøða**

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | **31.12.2021** | **31.12.2020** |
| Áogn | | 427.934 | 381.588 |
| Tøkur peningur | 4 | 2.858.036 | 2.809.759 |
| **Ogn í alt** | | **3.285.970** | **3.191.347** |
| Eginpeningur | | 4.195.146 | 3.191.071 |
| Goldið út av inniogn | 5 | - 912.609 | 0 |
| **Eginpeningur í alt** | | **3.282.537** | **3.191.071** |
| **Skuld í alt** | | **3432** | **276** |
| **Eginpeningur, skuld og avsetingar í alt** | | **3.285.970** | **3.191.347** |

**Á fundi tann 23.05.2022 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við roknskapinum sum hann er uppsettur.**

**Tilmæli hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 65/2022 – Reguleringar til Fíggjarætlanina ALMENT**

J.nr.: 1107-8-2021

Viðvíkjandi at flyta játtan til íløgur frá 2021 til 2022 og eykajáttanir.
Fíggjarnevndin hevur gjøgnumgingið íløgurnar, ið vórðu játtaðar í 2021, men sum ikki blivu nýttar, tí arbeiðið bleiv seinkað, og mælir til, at hesin peningur verður fluttur til 2022, og at hesar eykajáttanir verða gjørdar:

**Flutt frá undanfarna ári**

| | |
|---|---|
| §2 Ellis og Røktarheim íløga | 369.000 |
| §3 Frítíðarskúlin íløga | 653.000 |
| §6 Byggibúning Ólavsvegur | 514.000 |

| | |
|---|---|
| §6 Spillvatnsætlan íløga | 100.000 |
| §7 Havnin íløga | 336.000 |
| **Í alt** | **1.972.000** |

**Játta eyka íløgur**

| | |
|---|---|
| §4 Tofta skúli klæða miðb. | 400.000 |
| **Í alt** | **400.000** |

**Játta eyka rakstur**

| | |
|---|---|
| §3 skúlabólkur løn | 80.000 |
| §6 Gøtur, Agnið- Gadd | 90.000 |
| **Í alt** | **170.000** |

**Fíggjarnevndin mælir sostatt til, at kr. 1.972.000 verða fluttar frá undanfarna árið, kr. 400.000 verða játtaðar eyka til íløgur og kr. 170.000 játtaðar eyka til rakstur í alt kr. 2.542.000. Peningurin verður tikin av tøkum peningi. Eisini mælir fíggjarnevndin til at tær kr. 8.000.000 av láninum ið ikki blivu nýttar í 2021 verða fluttar til 2022.**

**Tilmæli hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 66/2022 – Fíggjarætlan 2023 – Bókasavnið í Nes kommunu ALMENT**
J.nr. 2205-2-2022

Fíggjarætlanin fyri 2023 hjá Bókasavninum í Nes kommunu erkomin til ummælis.

**Høvuðstølini eru hesi:**

| | **2023** | **2022** |
|---|---|---|
| Lønir | 76.000,- | 76.000,- |
| Húsaútreiðslur | 4.500,- | 4.500,- |
| Fólkabókasavn | 71.000,- | 71.000,- |
| Skúlabókasavn | 40.000,- | 40.000,- |
| Aðrar útreiðslur | 67.500,- | 67.500,- |
| Innbúgv | 5.000,- | 5.000,- |
| **Útreiðslur í alt** | **264.000,-** | **264.000,-** |

# Bygdaráðsfundur 30.05.2022

| | | |
|---|---|---|
| **Inntøkur:** | | |
| Skúlabókastudningur | 40.000,- | 40.000,- |
| Kommunustudningur | 163.500,- | 163.500,- |
| Hølisvirði | 4.500,- | 4.500,- |
| Landskassastuðul | 56.000,- | 56.000,- |
| **Inntøkur í alt** | **264.000,-** | **264.000,-** |
| | | |
| Útreiðslur tilsamans | | - 264.000,- |
| Inntøkur tilsamans | | 264.000,- |
| | | |
| **Úrslit samb. fíggjarætlan 2023** | | **0,-** |

**Á fundi tann 17.05.2022 mælir Mentanarnevndin til at góðkenna fíggjarætlanina 2023, sum hon er uppsett.**

**Á fundi tann 23.05.2022 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini.**

**Tilmælini hjá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**Mál nr. 67/2022 – Loyvi til taðing – Mortan Højgaard ALMENT**
J.nr.: 234022-34-2019

Í teldubrævi, dagfest 13 mai 2022, biður Mortan Højgaard um loyvi til at taða. Talan er um seyðatøð frá seyðahúsinum í Húshaganum.

Staðsetingin er framvið festivegnum omanfyri vatnbrunnarnar.
( sí viðløgdu skjøl )

**Á fundi tann 18.05.2022 mælir Tekniska nevnd til at játta loyvi at taða sambært vegleiðing frá Umhvørvisstovuni.**

**Tilmæli hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 68/2022 – Umsókn um broytan av byggiloyvi til bilskúr – Christian Andreasen ALMENT**
J.nr.: 234022-2-2017

Í teldubrævi, dagfest 06. mai 2022, kemur fyrispurningi frá byggifyritøkuni, sum stendur fyri at gera bilhúsið hjá Christian Andreasen, um loyvi at broyta byggiloyvið.

Broytingin innber at broyta takið frá at hava einvegis hall til at hava mønu. Teir vilja halda seg til ásettu hæddina á 2,5m úti við markið.

Sí viðløgdu tekningar.

**Á fundi tann 18.05.2022 mælir Tekniska nevnd til at játta broyting í byggiloyvinum.**

**Tilmæli hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 69/2022 – Umsókn um grundstykki – D. Eli í Hjøllum ALMENT**

J.nr.: 1205-11-2022

Í umsókn, dagfest 2. mai 2022, søkir Dánial Eli í Hjøllum um at fáa grundstykki til sethúsabygging. Grundøkið talan er um, er stykkið norðan fyri verandi sethús/grundøki hjá umsøkjaranum, í somu linju eystureftir og í mark hjá grannanum á tils 1310m$^2$.

**Á fundi tann 18.05.2022 mælir Tekniska nevnd til at játta grundstykki so markið fylgir markinuum norðanfyri sambært korti frá Teknisku deild.**

**Súni í Hjøllum var úti undir viðgerðini.**

**Tilmæli hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Súni í Hjøllum var úti undir viðgerðini.**

**Mál nr. 70/2022 – Máling av Barnagarðinum ALMENT**

J.nr.: 1206-3-2022

Vegna Nes kommunu hevur Teknistovan í Gøtu biðið Dekomáling v/Ian D. Jacobsen um tilboð uppá at mála barnagarðin.

Tilboðið ljóðar á kr. 159.425 u/mvg.

Teknistovan í Gøtu mælir til at taka av tilboðnum.

**Á fundi tann 18.05.2022 mælir Tekniska nevnd til at taka av tilboðnum á kr. 159.425 u/mvg.**

**Á fundi tann 23.05.2022 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd og at peningurin verður tikin av stovninum "Ábøtur á dagstovnar".**

**Tilmælini hjá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**Mál nr. 71/2022 – Útbjóðing av jørð á Regnavegnum og Høganesvegnum ALMENT**

J.nr.: 200002-3-2021
J.nr.: 1203-4-2021

Í eina tíð hevur verið umrøtt, hvussu farast skal fram við at bjóða út økini til íbúðarbygging við Regnavegin og við Høganesvegin.
Samskifti hevur verið m.a. við SÓKN Advokatar og Teknistovuna í Gøtu um at finna ein leist fyri útbjóðingina.

**Á fundi tann 18.05.2022 mælir Tekniska nevnd til taka undir við leistinum, vísandi til viðløgdu skjøl, frá SÓKN í samráð við Teknistovuna í Gøtu.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**